

*Eini 30 fyritøkur úr Føroyum, Danmark og Noreg taka lut á Faroexpo vinnustevnuni, sum er í Runavík í hesum døgum. Endamálið við stevnuni er fyrst og fremst at geva útflutningsfyritøkum møguleika fyri at hittast og tosa um samstarvsmøguleikar. Tá ið stevnan varð sett, sang ein gentukvartett fyri luttakarunum.*
*Mynd: Terji Nielsen*

virðisbrævamarknaðinum, og annað, ið hevur við vinnulív at gera.
Faroexpo byrjaði týsmorgunin, og stevnan endar hósdagin, tá ið stevnuluttakararnir fara á virkisvitjan.




*Hansina Dahl á snotuliga básinum hjá Sp/F Steinur á Faroexpo í hesum døgum.*
*Mynd: Terji Nielsen*

at selja ymisk sløg av steinum til skandinaviska marknaðin fingu Hansina og maðurin í sambandi við, at tey búðu í Portugál í fýra ár.
- Í Portugál eins og í flestu øðrum suðurevropeiskum londum rennur tú teg í stein dagliga. Har verður steinur nógv nýttur í byggivinnuni, og tú sært tað til dømis í svimjihallum, í sølumiðstøðum og almennum bygningum. Vit hugsaðu sum so, at hví kann hetta ikki eins væl nýtast í norðanlondum. Steinur er jú sterkt tilfar, og harafturat er tað viðlíkahaldsfrítt, so har skuldi eingin forðing verið, sigur Hansina Dahl.
Sp/F Steinur vil fegin, at steinur fer at verða meiri nýttur innan føroyska byggilist, og tey vóna tískil, at tey kunnu gera sítt til at fríðka um byggilistina her á landi.
Enn hevur fyritøkan ikki tær stóru bíleggingarnar, men Hansina Dahl sigur, at tey hava nakrar smærri bíleggingar, og at arbeitt verður við onkrum størri í løtuni.

# Longdi armurin hjá Føroyum

**Johs Bruun Bindslev er kunningarstjóri hjá Erhvervscenter Nordjylland. Hann sigur, at í Norðurjútlandi hava tey altíð kent seg sum longda armin hjá Føroyum í Danmark**

FAROEXPO
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Av teimum donsku stevnuluttakarunum á Faroexpo eru teir allarflest úr Norðurjútlandi. Johs Bindslev, sum sjálvur er ættaður úr Skagen, heldur tað ikki verða løgið.
- Tað hava altíð verið nógv føroysk áhugamál í Norðurjútlandi, og vit hava altíð kent okkum tætt knýttar við føroyingar, sigur hann.

### Altíð havt áhuga fyri Føroyum

Johs Bindslev sigur, at hann sjálvur altíð hevur havt ein serligan áhuga fyri Føroyum. Ein av orsøkunum er, at pápi hansara átti Skagens Avis, og har hevði hann eitt skifti ein føroying í læru sum blaðmann. Føroyingurin, sum lærdi hjá pápa Johs Bindslev, var eingin annar enn Ingi Samuelsen, blaðstjóri á Dimmalætting.
- Í Skagen eins og í Hirtshals, Fredrikshavn og øðrum størri plássum í Norðurjútlandi er tað fyrst og fremst fiskivinnan, ið nógv fólk liva av. Nógvir føroyingar starvast innan fiskivinnuna í økinum, og tað hevur eisini verið við til, at man altíð hevur havt ein ávísan kunnleika um Føroyar, sigur Johs Bindslev.
Hann sigur eisini, at sum heild er rættuliga stórur áhugi í vinnulívinum í Norðurjútlandi fyri Føroyum, og í hesum sambandi vísir hann á eitt konkret dømi.
- Tá ið eg fór undir fyrireikingarnar til hesa stevnuna og kunnaði limirnar hjá okkum um stevnuna, vóru tað ikki færri enn 35 fyritøkur, ið sýndu stevnuni áhuga. Sjálvsagt er luttakaratalið nakað væl minni, men áhugin fyri Føroyum er framvegis rættuliga stórur, sigur Johs Bindslev.

### Portrið til Danmark

Í sambandi við kommunalreformin í Danmark verður Hanstholm í næstum eisini partur av Erhvervscenter Nordjylland, og tá fer áhugin fyri Føroyum ikki at verða minni, heldur Johs Bindslev.
- Hanstholm er jú tað føroyska portrið til Danmarkar, tí tað er har, at Norrøna siglir til, og tí leggja túsundtals føroyingar leiðina umvegis Norðurjútland á hvørjum ári. At flutningssambandið sjóvegis millum Føroyar og Norðurjútland eisini er so mikið gott, hevur stóran týdning fyri vinnulívið í báðum økjunum, heldur Johs Bindslev.
Kunningarstjórin hjá Erhvervscenter Nordjylland heldur, at tað vinnulívið í Norðurjútlandi og Føroyum hava ótrúliga nógv felags áhugamál, og tí haldi eg, at samstarvsmøguleikarnir eru nógvir, sigur Johs Bindslev, sum sigur seg vænta, at nógv kemur burtur úr á Faroexpo.



*Johs Bindslev, kunningarstjóri hjá Erhvervscenter Nordjylland, heldur, at Norðurjútland er longdi armurin hjá føroyingum í Danmark.*
*Mynd: Terji Nielsen*

# Hirtshals – føroyski býurin í Danmark

**Vitjar tú donsku básarnar á Faroexpo, leggur tú beinan vegin til merkis, at býurin Hirtshals er sera væl umboðaður**

FAROEXPO
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Á stóra felagsbásinum hjá umboðunum úr Hirtshals er nógvur aktivitetur, og tað er ikki bara sum at siga tað at fáa orðið á donsku umboðini.

### Ein føroysk kommuna í Danmark

Býurin er umboðaður av eitt nú bæði vinnuráðnum, kommununi sjálvari og so sjálvsagt havnamyndugleikunum. At Hirtshals er vinarbýur við Runavík ger so eisini sítt til, at umboðanin á Faroexpo er so mikið góð.
Tá ið vit spurdu nøkur av umboðunum úr Hirtshals, hvussu tað ber til, at tey hava so mikið stóran áhuga fyri Føroyum, var svarið stutt og greitt:
- Vit eru jú í veruleikanum eitt slag av eini føroyskari kommunu í Danmark. Tað búgva sera nógvir føroyingar í Hirtshals, og føroyingar hava sanniliga eisini sett sín dám á vinnulívið í býnum, siga tey.
Nógvir bátar og skip, sum føroyingar eiga og reka, hava heimstað í Hirtshals, og hesi skip eru grundarlagið undir nógvum húsarhaldum í Norðurjútlandi, siga tey donsku umboðini. Eisini hevur virkið hjá Vestlax, sum føroyingar settu á stovn og áttu, verið ein av lívsæðrunum í býnum, men her er virksemið nógv minkað seinnu árini, og tað hevur havt við sær, at arbeiðsloysið í Hirtshals er vaksið munandi.

### Vinnulívið líkist

Ein av orsøkunum, at Hirtshals hevur so mikið stóran áhuga fyri Føroyum, er eisini tann, at føroyska vinnulívið og vinnulívið í Hirtshals eru so lík, sambært teimum donsku umboðunum.
- Í báðum støðum er fiskivinnan grundarlagið undir øllum vinnulívinum, men so kemur eisini øll møgulig hjávinna, ið er tengd at fiskivinnuni. Hetta er støðan bæði í Føroyum og í Hirtshals. Tí er ein slík stevna eisini eitt kærkomið høvi hjá fleiri pørtum av hesum vinnulívi at fáa eitt møguligt samstarv í lag, verður sagt.

